betri DEILDIN

# LEIKSKRÁ

04. juni 2023

SKRÁ NR. 6




TÓRI TORMÓÐSSON TRAÐARÁ NR. 1

07 VESTUR

# 12. UMFAR

HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður
tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo




# Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Fløtugerði - 530 Fuglafjørður
tel. 228771 if@if.fo www.if.fo

**Útgevari og ábyrgd**
ÍF-fótbóltur - Atli Petersen

**Sniðgeving og uppsetan**
Maibritt P. Bærentsen


betri.fo
Betri tannár
Til tín millum 13 og 17 ár
Kort
Netbanki
Nýtslukonta
Uppsparingarkonta
Boðtænasta
Fá ein ryggsekk, tá tú bíleggur títt fyrsta kort
Vitja eina av deildum okkara
betri

# INNIHALD

Dysturin í dag

Støðan í
Betri deildini

TEAM
ÍF

TEAM
07 Vestur

Dómarar

Toppskjúttar
eftir 11 umfør

Savnsgull 2

ÍF-sangurin



INTERSPORT®
intersport.fo

taf.fo
the athlete's foot®



BIRGIR PETERSEN

# DYSTURIN Í DAG

**Vælkomin til dyst í Betri-deildini.** Seinasta umfar leiktu vit heima ímóti suvérena oddaliðinum úr Klaksvík, sum ikki vóru mjúkir at strúka og góvu okkum turt uppá. Teir vóru ordiliga uppsettir uppá, at fáa víst hvar skápið skuldi standa. Hetta helst av at vit faktiskt áttu at verið fyrsta liðið, sum tók stig frá teimum í ár, tá vit brustu saman við Djúpumýru, fyrst í maj mánaða. Men vit blivu burturdømdir, tá vit áttu at havt javnað í evstu løtu, tí onkursvegna varð rangstøða dømd.

Nú snýr tað seg um hjá okkara monnum um at koma uppaftur á hestin eftir ein lakan mánaða, har onki stig

er komi á kontuna. Í dag taka vit ímóti 07 Vestur, sum vit taptu tepurt ímóti á Dungasandi í fyrsta umfarinum, í einum dysti, sum kundi fari báðar vegir. Har var tað okkara góði vinur Uros Stojanov, sum var óndur við sínar gomlu liðfelagar, og tryggjaði teimum ein 1-0 sigur. Vit kunnu leggja aftrat at teir slerdu okkum út úr steypakappingini. Hetta tilsamans gevur okkara monnum veruliga nakað at berjast fyri og at vísa at vit saktans klára at svara teimum aftur.

Í dag er okkara møguleiki at sleppa okkum upp frá botninum aftur, og tað eiga vit gera nú vit møta okkara nærmastu kappingarneytum. Týdningurin av úrtøkuni í dag er ættiliga avgerandi, tí at tað vísir seg at tey ovaru liðini í deildini eru sera tung at syfta.

**Góðan dyst øll somul.**
**Koyri á drongir**




**BÓLTASTUÐUL:**
Fuglafjarðar Havn




VÓNIN®

MILLUM FREMSTU MENNARAR,
FRAMLEIÐARAR OG VEITARAR AV
DYGDARGÓÐUM FISKIREIÐSKAPI

EFTIR 10 UMFØR

# STØÐAN

## Í BETRI DEILDINI HJÁ MONNUM

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 12 | 12 | 0 | 0 | 37 | 6 | +31 | 36 |
| 2 | HB | 12 | 9 | 2 | 1 | 33 | 6 | +27 | 29 |
| 3 | B36 | 12 | 9 | 0 | 3 | 27 | 12 | +15 | 27 |
| 4 | Víkingur | 12 | 6 | 3 | 3 | 25 | 13 | +12 | 21 |
| 5 | 07 Vestur | 11 | 4 | 1 | 6 | 17 | 18 | -1 | 13 |
| 6 | B68 | 11 | 2 | 5 | 4 | 11 | 19 | -8 | 11 |
| 7 | EB/Streymur | 11 | 3 | 1 | 7 | 8 | 23 | -15 | 10 |
| 8 | ÍF | 11 | 3 | 0 | 8 | 11 | 24 | -13 | 9 |
| 9 | TB | 11 | 1 | 3 | 7 | 5 | 29 | -24 | 6 |
| 10 | AB | 11 | 0 | 1 | 10 | 2 | 26 | -24 | 1 |

WWW.DYSTIR.FO

## 12. UMFAR

| | |
|---|---|
| 03.06.23 | KÍ - AB |
| 04.06.23 | EB/Streymur - TB |
| 04.06.23 | B36 - Víkingur |
| 04.06.23 | B68 - HB |
| 04.06.23 | ÍF - 07 Vestur |

## 13. UMFAR

| | |
|---|---|
| 10.06.23 | HB - B36 |
| 10.06.23 | 07 Vestur - Víkingur |
| 11.06.23 | EB/Streymur - B68 |
| 11.06.23 | AB - ÍF |
| 11.06.23 | KÍ - TB |

# KES.FO

HVS - VENTILATIÓN - HITAPUMPIR - SERVICE

Hjá Klima Energi Service leggja vit okkum eftir at veita dygdarvørur og -tænastur innan hita, ventilatión og orkuoptimering. Harafturat bjóða vit eftirlit av hitapumpum og ventilatiónsskipanum, bæði til privat og vinnu.

Tørvar tær eina nýggja hitapumpu ella ventilatións- og luftskiftisskipan, ella vilt tú hava vegleiðing um orkuskifti, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.




INFO@KES.FO - WWW.KES.FO - 258030

| | |
|---|---|
| Tóri **Traðará** | 1 |
| Elvio **Gelmini** | 2 |
| Jan **Ó. Ellingsgaard** | 3 |
| Tóri **N. Olsen** | 4 |
| Pól Jákup **Lundsbjerg** | 5 |
| Karl **A. Løkin** | 6 |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 |
| Ruben **Møller Nielsen** | 8 |
| Jhon Edy **Mena** | 9 |
| Jóhan **Petersen** | 10 |
| Markus **á Lakjuni** | 11 |
| Hans Jákup **J. Lervig** | 12 |
| Jákup **J. Nolsøe** | 13 |
| Gundur **E. Petersen** | 14 |
| Jákup **í Lambanum** | 15 |
| Líggjas **Heðinsson** | 16 |
| Jóhann **Højbro** | 17 |
| Petur M. **Lundsbjerg** | 18 |
| Rúnar **Johnsson** | 19 |
| Aron **Kensson** | 20 |
| Rógvi **Matras** | 21 |
| Elias **Lervig** | 22 |
| Hans **Jacobsen** | 23 |
| Gonzalo **Zárate** | 24 |
| Bergur **Jacobsen** | 25 |
| Sámal **Zachariassen** | 34 |

| | |
|---|---|
| Høvuðsvenjari: | **Aleksandar Jovevic** |
| Hjálparvenjari: | **Bartal Eliasen** |
| Málmansvenjari: | **Erling Joensen** |
| Fysiskur venjari: | **Gudmundur Danielsen** |
| Fysioterapeutur: | **Jónfríð Hansen** |
| Liðleiðari: | **Rói D. Olsen** |
| Liðleiðari: | **Heðin L. Olsen** |
| Liðleiðari: | **Fríði R. Petersen** |

**INNIHALD**

| | |
|---|---|
| Ari **Petersen** | 1 |
| Eiler **Fróðason** | 2 |
| Dánial Pauli **Lervig** | 3 |
| Rasmus Juel **Knudsen** | 5 |
| Daniel **Obbekjær** | 6 |
| Høgni **Nielsen** | 7 |
| Janus **Samuelsen** | 8 |
| Uros **Stojanov** | 9 |
| Jóhann **Joensen** | 10 |
| Jasper **Van Der Heyde** | 11 |
| Sámal **á Steig** | 12 |
| Steven **Van Dijk** | 12 |
| Julian **Mouritsen** | 17 |
| Jónas **Prior** | 18 |
| Jón **í Horni Nielsen** | 19 |
| Mathias **Voss** | 20 |
| Teitur **Olsen** | 21 |
| Jóannis **á Steig** | 23 |
| Pætur **Akselsen** | 25 |
| Heri **Klakkstein** | 26 |
| Oddur **Petersen** | 27 |
| Magnus **Jacobsen** | 52 |
| Albert Theis **Nielsen** | 70 |

Høvuðsvenjari: **Michael Schjønberg**
Hjálparvenjari: **Tór-Ingar Akselsen**

INNIHALD

DÓMARI

Rani **Skaalum**

1. HJÁLPARDÓMARI

Jón Marni **Johannesen**

2. HJÁLPARDÓMARI

Jógvan **Breckmann**

4. DÓMARI

Árni B. **Petersen**

DÓMARAEYGLEIÐARI

Jónfinn **Olsen**

magn




Green Marine Divers

Tlf.: +298 77 00 60

Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

samskip

SPEKT
løggildir grannskoðarar

**Tórshavn**
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

**Klaksvík**
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo



# TOPP10

## MÁLSKJÚTTAR Í BETRI DEILDINI

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Páll **Klettskarð** (KÍ) | 14 |
| 2 | Mikkel **Dahl** (HB) | 9 |
| 3 | Adrian **Justinussen** (HB) | 7 |
| 4 | Árni **Fredriksberg** (KÍ) | 6 |
| 5 | Bjarki **Nielsen** (B36) | 5 |
| 6 | Michal **Przybylski** (B36) | 5 |
| 7 | Claes Philip **Kronberg** (KÍ) | 5 |
| 8 | Sølvi **Vatnhamar** (Víkingur) | 4 |
| 9 | Uros **Stojanov** (07 Vestur) | 4 |
| 10 | Áki D. **Samuelsen** (HB) | 4 |

WWW.DYSTUR.FO

SAVNSGULL 2

# Hugleiðingar Fyri 28 árum síðani

EFTIR: **JÓGVAN Á LAKJUNI**





*Hugleiðingar:*

## *Fyri 28 árum síðani*

*Eftir Jógvan á Lakjuni*

Í einari leikskrá fyrr í ár varð greitt eitt sindur frá tí fyrsta árinum hjá ÍF í fyrstu deild ella *meistaradeildini*, sum tað tá æt. Hetta var í 1971, og her skal bara verða trivið í okkurt aftrat.

27. apríl 1971 skrivar Dimmalætting í ítróttarteiginum: ***Í fótbóltsdeildini er tann stórhending farin fram, at ÍF nú hevur meldað til meistaralið - sum sostatt verða seks í tali!*** Hini liðini í fremstu røð vóru tey "gomlu", VB, TB, KÍ, HB og B36, sum jú høvdu verið í fyrstu deild í langar tíðir.

Hetta var sera stórt stig hjá ÍF at taka, og hyggja vit at úrslitunum, so vísti tað seg eisini at vera ein stór avbjóðing. Liðið spældi 9 landskappingardystir og tapti allar uttan ein, og tað var ímóti B36 í Havn, har úrslitið bleiv 2-1 til ÍF. Liðið fekk kortini 4 stig hetta fyrsta árið í meistaradeildini, av tí at TB ikki møtti upp til tann seinasta dystin.

Endaliga støðan í meistaradeildini varð henda: HB fekk 18 stig, KÍ 16, VB 11, TB 6, B36 5 og ÍF 4.

Av málúrtøkuni hjá ÍF sæst, at liðið hóast alt skoraði 13 mál, og tað er ikki so heilt lítið í bara 9 dystum, men í hinum endanum gekst minni væl, 57 mál fóru inn.

Í Dimmalætting hetta árið verða nakrir av dystunum umrøddir, og hóast fullfíggjaður málskjúttaralisti ikki er uppgjørdur, so sæst, at Jákup Frants skeyt fyrsta málið hjá ÍF í meistaradeildini, og at bæði Sam og Hans Elias megnaðu at gera hat-trick.

Áku gjørdi eisini hat-trick hetta árið, men tað var í einum dysti í kappingini um Ísafjarðarsúluna, sum steypakappingin tá varð nevnd. Hesin dystur var ímóti TB. Dimmalætting sigur um dystin, at spælið ongantíð bleiv gott, og TB kom á odda 2-0. Men

**Í einari leikskrá fyrr í ár varð greitt eitt sindur frá tí fyrsta árinum hjá ÍF í fyrstu deildini ella meistaradeildini, sum tað tá æt. Hetta var í 1971, og her skal bara verða trivið í okkurt aftrat.**

27. apríl 1971 skrivar Dimmalætting í ítróttarteiginum: Í fótbóltsdeildini er tann stórhending farin fram, at ÍF nú hevur meldað til meistaralið – sum sostatt verða seks í tali! Hini liðini í fremstu røð vóru tey „gomlu", VB, TB, KÍ, HB og B36, sum jú høvdu verið í fyrstu deild í langar tíðir.

Hetta var sera stórt stig hjá ÍF at taka, og hyggja vit at úrslitinum, so vísti tað seg eisini at verða ein stór avbjóðing. Liðið spældi 9 landskappingardystir og tapti allar uttan ein, og tað var ímóti B36 í Havn, har úrslitið bleiv 2-1 til ÍF. Liðið fekk kortini 4 stig hetta fyrsta árið  í miestaradeildini , av tí at TB ikki møtti upp til tann seinasta dystin.

Endaliga støðan í meistaradeildini varð henda: HB fekk 18 stig, KÍ 16, VB 11, TB 6, B36 5 og ÍF 4.

Av málúrtøkuni hjá ÍF sæst, at liðið hóast alt skoraði 1 mál, og tað er ikki so heilt lítið í bara 9 dystum, men í hinum endanum gekst minni væl, 57 mál fóru inn.

Í Dimmalætting hetta árið verða nakrir av dystunum umrøddir, og hóast fullfíggjaður málskjúttarlisti ikki er uppgjørdur, so sæst, at Jákup Frants skeyt fyrsta málið hjá ÍF í meistaradeildini, og at bæði Sam og Hans Elias megnaðu at gera hattrick.

Áku gjørdi eisini hattrick hetta árið, m en tað var í einum dysti í kappingini um Ísafjarðarsúluna, sum steypakappingin tá varð nevnd. Heisni dystur var ímóti TB. Dimmalætting sigur um dystin, at spælið ongantíð bleiv gott, og TB kom á odda 2-0. Men so tók Áku sær um reiggj og skoraði 3 mál (í 27., 38. og 42. min), soleiðis at ÍF kundi fara til hálvleik við 3-2 leiðslu. ÍF megnaði tó ikki at vinna dystin, tí í seinna hálvleiki gjørdi Petur hjá TB hattrivk, og dysturin endaði við 6-3 til TB.

Um spælarnar hjá ÌF í hesum dysti sigur Dimmalætting: „Hjá ÍF var Signar, sum leikaði aftasti maður í verjuni, avgjørt bestur. Hann dugir at rokna út, hvussu spælið lagar seg, leikar tekniskt vakurt og roynir altíð at avlevera ístaðin fyri altíð at sparka himmalhøgt, sum so mangur annar gjørdi henda dag. Sam er eisini tekniskt góður leikari – hevur kanska lyndi til at halda ov leingi upp á bóltin viðhvørt. Áku fekk eisini væl burturúr, serliga í fyrra hálvleiki. Hetta er ikki bara sagt, tí hann gjørdi øll málini, men tí hann av og á vísti rætt vongspæl: oman til baklinjuna og inneftir."



## Prísir

Kaffi
Te
Heimabakað køka
Sunkist
5,-

Toast
Sodavatn 1/2 ltr.
10,-

Fleiri sløg av sigarettum

*Eisini fæst ymiskt góðgæti til keyps fyri sámuligan prís.*

*......hevur opið meðan 1. deildardysturin er*

*(framhald frá bls.7)*
so tók Áku sær um reiggj og skoraði 3 mál (27., 38. og 42 min.), soleiðis at ÍF lundi fara til hálvleik við 3-2 leiðslu. ÍF megnaði tó ikki at vinna dystin, tí í seinna hálvleiki gjørdi Petur hjá TB hat-trick, og dysturin endaði við 6-3 til TB.

Um spælararnar hjá ÍF í hesum dysti sigur Dimmalætting: "*Hjá ÍF var Signar, sum leikaði aftasti maður í verjuni, avgjørt bestur. Hann dugir at rokna út, hvussu spælið lagar seg, leikar tekniskt vakurt og roynir altíð at avlevera ístaðin fyri altíð at sparka himmalhøgt, sum so mangur annar gjørdi henda dag. Sam er eisini tekniskt góður leikari - hevur kanska lyndi til at halda ov leingi upp á bóltin viðhvørt. Áku fekk eisini væl burturúr, serliga í fyrra hálvleiki. Hetta er ikki bara sagt, tí hann gjørdi øll málini, men tí hann av og á vísti rætt vongspæl: oman til baklinjuna og innfyri.*"

**Myndin á bls. 7**
Henda myndin stóð í blaðnum, *Árið, ið fór 1971*, og teksturin undir myndini var:

*Hetta var fyrsta árið hjá ÍF í meistaradeildini, so ein væntaði ikki tey stóru úrslitini, men tað eydnaðist teimum tó at fáa 4 stig, 2 móti B36 og 2 móti TB, sum ikki møtti upp til seinasta dystin. Á myndini av ÍF síggja vit aftast frá vinstru: Sam Jacobsen, Jákup Frants Larsen, Signar Hansen (á Brúnni), Dánjal Jákup Petersen (Áku), Jógvan á Lakjuni, Herman Midjord, Leivur Harryson, Hans Sederius Joensen, Steinbjørn í Lambanum, Birgir Thomsen og Hans Elias Joensen.*

Hendan myndin stóð í blaðnum, Árið, ið fór 1971, og teksturin undir myndini var:

Hetta var fyrstu árið hjá ÍF í meistaradeildini, so ein væntaði ikki tey stóru úrslitini, men tað eydnaðist teimum tó at fáa 4 stig, 2 ímóti B36 og 2 ímóti TB, sum ikki møtti upp til seinasta dystin.

á myndini av ÍF síggja vit aftast frá vinstru: Sam Jacobsen, Jákup Frants Larsen, Signar Hansen (á Brúnni), Dánjal Jákup Petersen (Áku), Jógvan á Lakjuni, Herman Midjord, Leivur Harryson, Hans Sederius Joensen, Steinbjørn í Lambanum, Birgir Thomsen og Hans Elias Joensen

NÝRÙM

Teknistova

einar@nyrum.fo

tlf 78 88 99



# BMT

Byggimestarin Thomsen

Tel 580044
Alt kann gerast


# TAKK FYRI STUÐULIN

# Leiðandi reiðarí í norðurhøvum




VARÐIN

P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo

OKKARA KJARNUØKI

**GRANNSKOÐAN**
ROKNSKAPARHJÁLP
**SKATTUR**
VIRKISRÁÐGEVING
**BÓKHALD**
MEIRVIRÐISGJALD



Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

# SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**